# Eldur í IRF bili



*Ikki er greitt, hví eldur kom í ein IRF bil í Klaksvík mánakvøldið*

*Mynd: Bárður Lydersen*

**Mánakvøldið um hálvgum átta tíðina fekk Sløkkiliðið í Klaksvík eina fráboðan um, at roykur kom úr einum IRF bili, sum stóð heiman fyri Strandferðslubygningin við ferjuleguna**

ELDSBRUNI
*Solby A.Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
Tað var um hálvgum áttatíðina, at fólk kom gangandi eftir Nólsoyar Pálsgøtu og varnaðist, at roykur kom úr IRF bilinum. Boð vórðu send eftir Sløkkiliðnum, sum bar skjótt at.

Tá teir komu á staðið, sendu teir boð eftir bilføraranum, tí ikki bar til at fáa lúkuna upp á bilinum uttan, at hann stóð í gongdi. Meðan bíðað varð eftir honum, kølaði Sløkkiliðið bilin niður uttan.

Tá lúkan var fingin upp, sást eldur í ruskinum. Eldurin varð sløktur eftir einari lítlari løtu, og síðani koyrdi bilurin út á bingjuplássið hjá IRF á Bumshamri, har bilurin varð tømdur.
Ikki er greitt, hví eldur kom í nýggja IRF bilin mánakvøldið, og fráboðanin kom í so mikið góðari tíð, at ongin skaði varð á bilin.

# Haruveitsla á Viðareiði

**14. februar kunnu øll haruáhugað savnast á hotel Norð á Viðareiði til hugna. Tá skipar hotellið fyri einari haruveitslu**

TÍÐINDASKRIV
*Solby A Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Nú er harutíðin av á hesum sinni, og hotel Norð á Viðareiði fer tí at skipa fyri einari veitslu fyri øllum haruskjúttum og áhugaðum í norðoyggjum. Lagt verður upp til eitt kvøld, har høvi so sanniliga verður til at práta og reypa um haruskjóting. Hetta er fyrstu ferð, at verandi eigari skipar fyri eini tílíkari veitslu á hotellinum, men tað var gamalt fyrr.
– Um hendan veitslan eydnast væl, so er hon komin fyri at verða, sigur Jógvan Heinesen, hoteleigari.

Á skránni er millum annað at fólk frá Svend Krosstein koma at sýna byrsur og aðra útgerð fram. Og eisini kemur onkur at greiða frá um harur og haruskjóting sum heild.

Allir hagapartar í norðoyggjum fáa bræv um hesa veitsluna, og ætlanin hjá fyriskiparunum er, at fáa hagtølini yvir hvussu nógvar harur eru skotnar í hvørjum hagaparti hendan veturin. Og so verður virðisløn handað besta hagapartinum og besta skjúttanum.

Kvøldið byrjar við einum góðum veitsludøgurða, sangur og annað undirhald verður somuleiðis á skránni.

Til ber at tekna seg til veitsluna við at ringja 451244 ella 217020






# Ógvusligt rentufall farnu vikuna

MARKNAÐARRÁK

Farna fríggjadag var stóra mánaðarliga arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin úr USA kunngjørd. Hendan gjørdist eitt satt vónbrot, tí einans 1.000 arbeiðspláss vóru sett á stovn í desembur. Væntað varð, at talið fór at gerast 150.000. Kunngerðin av frágreiðingini førdi við sær, at lánsbrævarentur sum heild lækkaðu ógvusligt. Rentan á danska statslánsbrævinum við einari gildistíð á 10 ár lækkaði fríggjadagin niður á 4,3%, ið er lægsta stigi síðani byrjanina av oktobur.

Eftir at dollarin var styrknaður nakað fyrr í vikuni, førdi sama frágreiðing við sær, at dollarin viknaði munandi fríggjadagin. Orsøkin er, at marknaðarluttakarar nú aftur kunnu seta spurnaðartekin við styrkina í amerikanska búskapinum samstundis sum sannlíkindið fyri einari amerikanskari rentuhækking er minkað.

Eisini fundurin hjá evropiska miðbankanum (ECB) hósdagin, har avgjørt var ikki at lækka leiðandi rentuna, fekk dollaran at vikna. ECB metur at sterka evran kann tálma útflutinginum, men at búskaparstøðan í heiminum togar rætta vegin. Av tí at ECB ikki metti, at sterka evran er ein hóttan á verandi stigi, styknaði evran meira. Áðrenn fundin hjá ECB kostaðu 100 dollarar 592,93 krónur, men eftir fundin og vánaligu tølini úr USA fall dollarin til 580,30 kr.

Orsakað av feskastu tíðindunum úr USA og gjaldoyrastøðuni kann væntast, at renturnar hesa vikuna kunnu fella meira. Hinvegin verður væntað, at roknskaparkunngerðir úr USA eisini fara at ávirka bæði lánsbræva- og partabrævamarknaðirnar. Hesa vikuna kunngerða nevnliga navnfromu virkini Intel, Yahoo!, Apple, General Electric, IBM og Microsoft roknskapir teirra fyri 4. ársfjórðing 2003. Higartil hevur m.a. Alcoa, ið er ein av heimsins størstu aluminiumframleiðarum, kunngjørt roknskap. Hesin gjørdist góður, og væntað verður, at roknskapirnir fyri 4. ársfjórðing sum heild gerast góðir. Um so verður, vil hetta føra við sær hækkandi partabrøv og lánsbrævarentur.

Hinvegin vil laka arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin frá fríggjadegnum eisini hava stóran týdning fyri marknaðirnar næstu vikurnar. Frágreiðingin er sera týðandi, umenn hon kann vera óstøðug. Vit kunnu tí vænta, at frágreiðingin í ávísan mun, kann virka sum eitt loft yvir lánsbrævarentunum og partabrøvunum næsta mánaðin.

Rentur

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,54% | -0,22% |
| 5 ára lánsbræv | 3,41% | -0,25% |
| 10 ára lánsbræv | 4,29% | -0,21% |

Partabrævavísitøl

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 255,5 | 0,8% |
| OMX, Svøríki | 647,9 | 0,5% |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2.688,9 | -0,6% |
| S&P 500, USA | 1.121,9 | 0,0% |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 107,71 | 0,3% |
| Evru Lánsbrøv | 164,51 | 0,1% |
| Norrøn Partabrøv | 74,73 | 3,2% |
| Altjóða Partabrøv | 73,46 | 1,5% |

Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 578,07 | -1,6% |
| EUR | 744,75 | 0,0% |
| GBP | 1.073,20 | 1,1% |
| NOK | 86,16 | -2,3% |

*Renta og kursir kl. 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*



# Kvinnur - framtíðin í politikki

**Politisku flokkarnir hava ein felags trupulleika at dragast við. Tað gongur striltið at fáa kvinnur at stilla upp! Talið á kvinnum, ið bjóða seg fram til løgtingsval, er tó alsamt vaksandi**

LØGTINGSVAL



*Saman við Elisu vóru fleiri aðrar smágentur millum áhoyrararnar í Mikladali. Kanska stillar onkur av teimum upp, tá eini trý valskeið aftrat eru farin afturum — livst so spyrts*



*Við himmalvendum eygum lýðir Elisa á, meðan ein av kvinnuligu valevnunum hevur orðið á valfundinum, sum flokkarnir í Norðoya valdømi skipaðu fyri í Kalsoynni leygardagin*

Á heimasíðuni hjá Javnstøðunevndini sæst, at talið á kvinnum, ið bjóða seg fram til løgtinsvalið er vaksið úr 9% í 1980 til 23% í 2004.

Síggja vit burtur frá Hinum stuttliga flokkinum, sum bert hevur 6 valevni, eru Tjóðveldiskvinnur fremst við 27%. Aftast liggja kvinnurnar hjá Sjálvstýrisflokkinum við 15%.

Hyggja vit at valdømunum, liggja Vágar fremst við 30% og Sandoyggin aftast við 13%.

Tá tað kemur til kynsbýtið, byrjar Hin stuttligi flokkurin væl. Tey hava býtt seg kristiliga við 3 kvinnum og 3 monnum.

Undanførslan hjá kvinnum at stilla upp, er oftast, at tær siga seg ikki hava skil fyri politikki.

Tað var í 1964, at ein kvinna; Malla Samuelsen, fyrstu ferð tók sæti á tingi, tó bert í eina viku ella tvær. Onnur kvinna var Karin Kjølbro, sum var varamaður í nakrar dagar í 1971.

Fyrsta kvinnan, sum fekk meira støðugt sæti á tingi, var Jona Hendriksen. Hon kom sum varamaður fyri Jákup Lindenskov, ið varð landsstýrismaður í 1975.

Og á løgtingsvalinum í 1978 eydnaðist Jonu Hendriksen og Karin Kjølbro at skriva søgu á Føroya Løgtingi, við at vera fyrstu kvinnur, ið vórðu valdar inn á ting.

Trý tey seinastu valskeiðini vórðu 4 kvinnur valdar á ting. Bestu umboðan høvdu kvinnurnar í 1996-98; tá sótu 6 kvinnur á tingi.

Við seinasta val stillaðu 48 kvinnur upp. Hesaferð stilla 58 kvinnur og 195 menn upp til løgtingsvalið.

Eyðun Elttør, landsstýrismaður:

# ChevronTexaco skal vera vælkomið

2. ÚTBJÓÐING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*



*Eyðun Elttør, landsstýrismaður: – Ver vælkomið ChevronTexaco*

Í farnu viku boðaði ein av stjórunum í risastóra amerikanska oljufelagnum ChevronTexaco frá, at leiting eftir olju og gassi á føroyska landgrunninum stendur ovarliga í teirra arbeiðsskrá komandi árini. Felagið ætlar sær at vera við til at bjóða í 2. útbjóðing á landgrunninum. Hetta hóvar Eyðun Elttør, landsstýrismanni í oljumálum sera væl. –ChevronTexaco skal vera vælkomið til Føroyar við síni stóru vitan og ekspertisu at hjálpa okkum at finna, hvar olja og gass liggur fjalt í okkara undirgrund. Tað kann bert gagna eini 2. útbjóðing, at eitt so stórt felag sum ChevronTexaco eisini vil vera við í leitingini á landgrunninum sigur landsstýrismaðurin, sum eisini vónar, at tað fer at bera til at gjøgnumføra útbjóðingina sum ætlað uttan mun til valið komandi.

Eyðun Elttør heldur tað eisini vera áhugavert og gott at fáa eitt felag inn á Føroyaøkið, sum er so virkið á øllum Atlantsmótinum og her ikki minst í grannalagnum tvs. í økinum vestan fyri Hetland. – Tað er sera hugaligt at hoyra, at eitt so stórt oljufelag hevur valt sær Atlantsmótið sum eitt av sínum kjarnuøkjum. At felagið hevur í umbúnað at bora ein brunn beint við markið longu í summar og at onkur av feløgunum, sum eru virkin á okkara landgrunni, verða við í tí boringini, sum skilst, eru eisini sera góð tíðindi fyri okkum. Tí tann vitan tú fær beint hinumegin markið kann vera gullverd fyri okkum, tá vit skulu til at bjóða út øki, sum kanska fara at liggja nærhendis heldur landsstýrismaðurin.

## Meira veljarakanning

Hvussu og hvar flyta veljararnir milllum flokkarnar

Lesið Sosialin hósdagin

## Javnaðarcafé í Bládýpinum

Nú tað veruliga stundar til val og valstríðið er í hæddini, skipar Suðurstreymoyar Javnaðarfelag fyri politiskum café kvøldum í Bládýpinum í Dr. Jakobsensgøtu. Kvøldini eru skipað sum evniskvøld.

Mikukvøldið er evni uppskotið hjá Javnaðarflokkinum um Tjóðskaparliga semju í sjálvstýrismálinum. Caféin byrjar mikukvøldið klokkan 20, og tað verður Helena Dam á Neystabø, sum skipar fyri.

## Valkvøld á Platform

**Politisku ungmannafeløgini fara fríggjakvøldið í Platform at stríðast um ungu veljararnar**

VALKVØLD

Dansistaðið, Platform, skipar fríggjakvøldið fyri politiskum kvøldi. Ungmannafeløgini hjá Fólkaflokkinum, Sambandsflokkinum, Javnaðarflokkinum, Sjálvstýrisflokkinum og Tjóðveldisflokkinum fara frá klokkan 22 fríggjakvøldið.

Ungmannafeløgini fáa stutt skotbrá, tí tey fáa bert 2 X 1 min at greiða frá sínum boðskapi. Hetta er gjørt fyri at fáa ein so stuttligan og beinraknan boðskap sum gjørligt. Platform boðar frá, at tað er strangt 18 ára aldursmark og ein kann bert ogna sær atgongumerki við at venda sær til ungmannafeløgini.